LM-116/2020

FYLGISKJAL 3

Hanna D. Andreassen

Fra: Vivie Kirke Davidsen <vivie.davidsen@skulin.fo>
Sendt: Thursday, January 7, 2021 13:44
Til: Mentamálaráðið
Emne: Viðmerking til uppskot til Løgtingslóg

Opfølgningsflag: Opfølgning
Flagstatus: Afmærket

Til rættað viðkomandi:

Eg havi lisið tekstin og havi eina viðmerking:

Brot úr uppskot til Løgtingslóg:

§ 3, stk. 3
Ásetingin er nýggj. Álagt verður útbúgvingarstovninum at hava eftirlit við ásetingunum um lestrarvirkni, sum lýstar eru í seinnu helvt av § 3, stk. 1. Talan er um, at útbúgvingarstovnurin skal hava eftirlit við, meta um og boða frá, um tann lesandi er lestrarvirkin. Álagt verður útbúgvingarstovninum at boða Studna frá javnan, og endamálið er at tryggja, at lesandi, sum eru upptikin á útbúgving men ikki møta til frálæru og ikki lata inn uppgávur ella fara til prótøkur, ikki fáa stuðul útgoldnan.

Vísandi til omanfyristandandi, so er altíð ein proces í gongd áðrenn ein næmingur gevist, um ikki næmingurin sjálvur velur at gevast. Hetta er at næmingurin fær ávaring 1, og síðani ávaring 2, og til síðst verður koyrdur út, um uppmøtingin ikki batnar. Í heilt fáum førum, gevist ein næmingur bara, uttan at man hoyrir frá teimum aftur. Men tá hava tey sum oftast sagt við aðrar næmingar. Her verður roynt at fingið fatur á teimum, og tá tey hava verið burtur yvir 2 -3 vikur, og ikki svara telduposti, so verða tey frámelda hjá Studna.

So onkursvegna kundi orðingin kanska verið meira greið, og bara álagt skúlanum, at boða Studna frá, tá ein næmingur er givin. Har er altíð dokumentatión fyri hesum, antin við eini skrivligari fráboðan frá næminginum, um at hann er givin, ella við einum skrivið frá skúlanum til næmingin, um at viðkomandi er koyrdur úr skúlanum, vegna onkra orsøk, sum oftast ringa uppmøting.

Vinaliga

Vivie Kirke Davidsen
Skúlastjóri

Heilsuskúli Føroya
Grønudalur 2
950 Hov

Teldupostur: heilsuskulin@skulin.fo / vivie.davidsen@skulin.fo
Telefon: 294200